Øðrvísi síðsti skúladagur

Næmingarnir á HF skeiðnum í Klaksvík málaðu náttina undan síðsta skúladegi fasaduna á bygningi í grannalagnum

Húsið yvir av HF bygningum hevur í longri tíð skriggjað eftir máling. Fríggjanáttina málaðu HF næmingarnir fasaduna, so nú er tað ein vøkur sjón

SKÚLI
Solby A. Eliasen

Klaksvík:
Smálombini fjølgast, og tað er tekin um, at tað ber móti sumrinum. Eitt annað tekin um, at nú er summarið ikki so langt burtur, er skúlaárið. Fríggjadagin var seinasti skúladagur hjá HF næmingunum. Næmingarnir plaga at vera í skúlanum náttina undan seinasta skúladegi. Okkurt øðrvísis plagar at vera á skránni.

Tað ræður um at nýta hugflogið. Viðhvørt hevur tað, sum er komið burturúr, ikki verið so heppið, men í øðrum førum verður seymurin raktur á høvdið.

Tá í klaksvíkingar fóru eftir Klaksvíksvegnum í góðveðrinum fríggjamorgunin sóu tey, at bygningurin, har HF skeiðið heldur til, var prýddur við ballónum, skeltum og bannarum. Soleiðis plagar tað at vera seinasta skúladagin. Tað, sum var øðrvísi, var hinumegin vegin. Í góðveðrinum fríggjanáttina høvdu næmingarnir mála fasaduna á bygninginum, sum er við síðuna av Roykstovuni.

Har hevur longi verið tørvur á máling, og nú syrgdu HF næmingarnir fyri, at næmingarnir, sum koma aftaná, fara at síggja eina vakrari sjón, enn hesir næmingarnir hava sæð.

Fasadan er málað blá og heilt ljóst gul. Íblásturin til litsamansetingina siga næmingarnir seg hava fingið úr Tunis, har teir vitjaðu seinasta heyst.

Tá vit komu framvið, løgdu næmingarnir seinastu hondina á verkið. So bjóðaði fyrsti HF flokkur kaffi og morgunbreyð.

Næstu tveir mánaðirnar verður lítið annað enn skúli, prótvøkulesnaður og prótvøkur á skránni hjá HF næmingum kring landið. Tey skulu longu í komandi viku til fyrstu skrivligu prótvøkurnar, og seinni skulu tey til munnliga prótvøku í øllum lærugreinunum, tey hava havt í ár.

Snarferð til Billund
- við flogfari og gisting
í 2 nætur í Billund
frá kr. 2.185* t/r fyri hvønn
*til 15 farleist sumun. Mágur barnarsæti fáttur verður givin. Ur Føroyum hildag alla leygardag í tíðarskeiðinum 1. apr.-16. jun. og 14. aug.-22. okt. 2003.
Flogfelag Føroya, Tlsm. 345696, Flogv. 345693, travel@mf.fo
Fonn Flog, 154343, fonnflog@fonnflog.fo
Mik Travel, 322121, mik@mik.fo
Faroe Travel, 312699, faroetravel.fo
MAERSK AIR
It's got to be perfect

Javnaðarfelagið og Tjóðveldisfelagið í Eysturoynni bjóða til fundar um eftirlønir, vinnupolitikk og privatiseringar

Spurningurin um eftirlønarskipanir, vinnupolitikk og privatiseringar er meira viðkomandi nú enn nakrantíð áður. Almennur pallborðsfundur verður í Hædtini í Runavík mikukvøldið 7. mai kl. 19.30, har Vilhelm Johannesen og Andrias Petersen fyri Javnaðarflokkin og Heini Ø. Heinesen og Páll á Reynatúgvu fyri Tjóðveldisflokkin fara at umrøða hesi evni. Møti fjølment og vísi at áhugi fyri samfelagsviðurskiftum ger mun

Eysturoyar Tjóðveldisfelag
Eysturoyar Javnaðarfelag

Miðbýarin

Hátrýst yvir Føroyum

Lágtrýstini standa alsamt í bíðirøð vestan fyri Føroyar. Kortini hevur tað eydnast einum einsamøllum hátrýsti at trokað seg framum. Tað er 500 bar og hægsta hátrýst, ið hevur verið her um leiðir. Hetta hátrýst verður verandi, og endamálið er eittans: At beina burtur leysa máling, skitt og aðra óhumsku. Vilt tú hava skitt ella leysa máling av vegginum ella takinum, er at taka telefonina og trýsta 42 31 11. So koma vit á staðið við okkara rullandi hátrýsti!

Ring 42 31 11

SANDBLÁSING
VEGGJAREINSAN & TAKREINSAN

Spf. Sandblásing · 488 Ljósá · Telefaks 42 34 32 · sandblas@post.olivant.fo

Karsten góðtekur ikki sáttmála hjá SEV

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum vil ikki góðtaka, at SEV hevur givið maskinmeistarunum 8,8% í lønarhækkan umframt hækkan av eftirløn

Karsten Hansen setir hart móti hørðum. Hann kann als ikki góðtaka ein sáttmála, sum gevur næstan 11% samlaða lønarhækkan, sum SEV hevur gjørt við Magismeistarafelagið

BÚSKAPUR
Heri á Rógvi

Maskinmeistarafelagið og Elfelagið SEV undirskrivaðu síðst í mars mánaði ein nýggjan tvey ára lønarsáttmála.

Hesin er galdandi frá 1. mars og tvey ár fram. Sáttmálin gevur teimum umleið 45 maskinmeistarunum hjá SEV 4,3% lønarhækkan 1. mars 2003 og tað sama árið eftir. Somu dagar hækka eftirlønargjøldini við einum prosenti.

Hesin sáttmálin hevur verið eitt av grundarløgunum undir verandi lønarsamráðingum á privata arbeiðsmarknaðinum.

Við øðrum broytingum gevur sáttmálin maskinmeistarunum eina samlaða hækkan áljóðandi millum tíggju og ellivu prosent.

Men hetta heldur Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, vera alt ov mikið. Sáttmálin skal góðkennast av Fíggjarmálaráðnum, men hetta ætlar Karsten ikki at gera soleiðis uttan víðari. Landsstýrismaðurin kann ikki góðtaka eina tílíka hækkan, og hann kolldømir sáttmálan.

– Enn havi eg ikki fingið sáttmálan á borðið hjá mær, men eg havi frætt um sáttmálan. Og fyribils havi eg ikki fingið nóg góð argumentir til at góðkenna sáttmálan, sigur Karsten Hansen.

Orsøkin er einføld: Lønarhækkingin er ov stór.

Tað er kortini eitt sindur ógreitt, hvørjar fylgjur hetta fær. Hvørki Karsten Hansen ella Maskinmeistarafelagið kundu fríggjadagin geva okkum nakað svar, men greitt er, at Karsten Hansen hevur góðkenningar myndugleika á økinum.

Av skrivstovuni hjá Maskinmeistarafelagnum siga tey, at tað vanliga ikki hevur verið nakar trupulleiki at fáa sáttmálarnar góðkendar, og tað verður roknað við, at SEV kann samráða seg til ein sáttmála.

30 sáttmálar

Stutt eftir, at partarnir á privata arbeiðsmarknaðinum eru lidnir at samráðast, fer Karsten Hansen og Fíggjarmálaráðið at samráðast við ymsu fakfeløgini innan almenna sektorin.

Samanlagt skal Fíggjarmálaráðið við samráðingum fáa einar tretivu sáttmálar upp á pláss.

Karsten Hansen sigur, at við seinastu samráðingar fingu fakfeløgini innan almenna sektorin 12,5% í samlaðari lønarhækkan yvir tvey ár og sjey mánaðir.

– Hetta er tann hægsta hækkanin nakrantíð, og so nógv verður tað ikki hesaferð, sigur Karsten Hansen.

Hann sigur, at eftir kreppuárini vóru lønirnar komnar langt niður, og landið kundi tískil ganga við til eina so stóra hækkan. Men nú er aðrar tíðir.

–Vit hava havt eina ekstremt høga lønarhækkan, sum er hægri enn í flest øðrum londum. Men nú er vend komin í búskapin. Tann methøgi búskaparvøksturin heldur ikki fram, og tískil er ikki rúm fyri stórum lønarhækkanum, sigur Karsten Hansen.

Skattalætti

Filosofiin hjá Karsten Hansen og landsstýrinum er heldur at geva skattalættar enn stórar lønarhækkingar.

– Tað er mín fatan, at skattatrýstið - serliga á teimum við miðal- og láinntøkum – er ov høgt, og tískil er eisini neyðugt við skattalættum, sigur Karsten Hansen.

Og stendur tað til Karsten Hansen, so skal skattalættin telja nógv í komandi samráðingum. Men hetta vilja fakfeløgini ikki hoyra talan um, og tey afturvísa blankt, at skattalættin fær nakra sum helst ávirkan á lønarkørv.

Á 1. mai haldinum í Havn staðfesti Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, hesa støðu.

– Eru skattalættarnir bara til fortreð, sum Ingeborg Vinther sigur, so dugi eg ikki at síggja nakra meining við teimum, sigur Karsten Hansen.

– Nær hevur nakar sáttmáli givið so nógva hækking í realløninni sum skattalættin?, sigur Karsten Hansen.

Skattalættin, sum Løgtingið hevur samtykt, fer at kosta landskassanum 270 mió. kr. í mistum inntøkum.

Og Karsten Hansen er ikki í iva um, at hvørki vinnulív ella tað almenna ikki hava ráð til eina stóra lønarhækkan.

–Vit mugu í síðsta enda gera ein sáttmála. So mugu vit taka fylgjurnar av honum. Vit binda okkum til at gjalda ávísar lønir, men vit binda okkum ikki til at hava øll í arbeiði, sigur Karsten Hansen.

Slakari úrslit

Yvirkskotið á landsroknskapinum er minkað við einari hálvari milliard í 2002 í mun til 2001. Neyðugt verður nú at stramma í við almennu útreiðslunum í ár, sigur fíggjarmálaráðharrin

Leif Abrahamsen, stjóri á Gjaldstovuni, leggur landsroknskapin fram hósmorgunin

ROKNSKAPUR
Heri á Rógvi

Hósmorgunin legði Leif Abrahamsen, stjóri fyri Gjaldstovuna, og Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, fram landsroknskapin fyri 2002. Sum vit skrivaðu í gjár, so vísti roknskapurin eitt yvirskot áljóðandi 191 milliónir krónur. Hetta er rakstrar, løgu- og útlánsúrslitið (RLÚ).

Avdráttirnir í 2002 vóru 144 milliónir, og landið hevði tá avtornaði 124 milliónir afturat í tøkum peningi. Hesir peningur er fyri ein stóran part av finna á bók í peningastovnum. Gjaldførið í Landsbankanum vaks ikki við hesari upphædd, men Leif Abrahamsen sigur, at peningur liggur á øðrum kontoum.

Sambært landsroknskapinum eigur føroyski landskassin 2,7 mia. í tøkum peningi.

Inntøkurnar hjá landskassanum vóru í 2002 3,973 milliardir, og útreiðslurnar vóru 3,542 milliardir. Íløgurnar vóru 240 milliónir.

Yvirskotið er 504 milliónir minni enn í 2001. Karsten Hansen sigur, at hetta serliga skyldast, at blokkurin er skerdur 366 milliónir og framdar eru fleiri yvirtøkur.

Sostatt sæst skerjingin í blokkinum týðuliga aftur.

Sjálvur er Karsten Hansen ikki í iva um, at var blokkurin ikki skerdur, so vildi fíggjarlógin bara verið tað hægri, og yvirskotið als ikki verið hægri.

Karsten Hansen er fegin um úrslitið, sum er góðar hundrað milliónir hægri enn roknað varð við.

Roknað verður við, at 2003 fer at geva nakað tað sama úrslitið sum 2002, sigur Karsten Hansen.

Skuld

Sambært landsroknskap-inum eigur landskassin eina samlaða ogn upp á 5,38 mia. Av hesum eru 2,7 mia. í tøkum peningi í Landsbankanum og á ymsum øðrum kontoum.

Í miðal hevði Landsbankin 2,4 milliardir innistandandi í desember 2002. Minstainnlánið, t.e. eitt kravd ogn hjá landinum roknað útfrá % av BTÚ, er 1.385 milliónir.

Samlaða skuldin var við árslok 2002 fimm milliardir.

Tað almenna ov dýrt

Á tíðindafundinum hósmorgunin nýtti Karsten Hansen eisini høvi til at nevna, at útfrá øllum búskaparligum spádómum, so nærkast føroyski búskapurin verri dagar enn seinastu gull árini hava bjóðað.

Hetta ger, at neyðugt verður at tátta í. Landsstýrismaðurin hevur sett tvey fólk at hyggja eftir almenna sektorinum við atliti at retionaliseringum, og samgongan er samd um at spara eitt prosent av fíggjarætlanini fyri 2004.

Og Karsten Hansen segði eisini, at eftir hansara tykki so vóru ráðini í umsitingini alt ov nógv. Níggju ráð er ov mikið, og hetta merkir í síðsta enda størri útreiðslur, segði Karsten Hansen.



Hesin grafurin vísir, hvussu inntøkurnar og útreiðslurnar nærkast hvørjum øðrum. Ovara linjan eru inntøkurnar og tann niðara útreiðslurnar.Hesin grafurin vísir, hvussu inntøkurnar og útreiðslurnar nærkast hvørjum øðrum. Ovara linjan eru inntøkurnar og tann niðara útreiðslurnar.

Grafur: Gjaldstovan